Stjørnurnar

Mánadagin ver›ur annar filmurin í rø›ini hjá filmsfelagnum Klipp s‡ndur í Nor›urlandahúsinum. Ta › er norski filmurin "Stjørnurnar", sum Torun Lian stjórna›i í 1998. Filmurin er um ta 11 ára gomlu Mariu og sakn hennara, tá hon missir lítlabeiggjan, sum doyr av krabbameini. Afturat tí meiningsleysa dey›anum noy›ist Maria eisini at dragast vi› sorgina hjá foreldrunum. Men í vinalagnum vi› hin javngamla og káta Jákup fær hon møguleikan at bróta skelina, hon er í, og vi›gera sorgina. Hóast tungur í evni, er hesin vir›islønti norski filmur bæ›i vakur og t‡dningarmikil í n‡ggjari norrøna filmsger›, sum fyrst og fremst vendir sær til børn frá umlei› 11 ára aldri. Í vi›tali hevur norski leikstjórin sagt, "at tann veruleiki at eg sjálv misti eitt barn, hevur einki vi› filmin at gera. Ta› hendi aftaná at eg hev›i skriva › bæ›i bók og søgu, sum filmurin byggir á." Torun Lian vil ikki hava hesa søguna, i› gjørdist hennara fyrsti filmur, benda inn á seg sjálva. Men so kann ein spyrja, hvar ein so tung søga hevur sín uppruna? "Eg var ógvuliga sorgarbundin og tung í huga ta› summari›, eg skriva›i søguna" sigur Torun Lian, "og ætlanin var í roynd og veru at skriva ein skemtileik til pallframførslu. Men eg helt at ta› fór at bøta um ringa lagi› hetta summari› vi› at skriva okkurt tungt og syrgiligt. Eg skriva›i tær fyrstu 30 sí›urnar, i› eins og fyrstu brotini í filminum eru ógvuliga hugtung. Tá bleiv eg í gó›um lag; ta› var eitt slag av reinsan." Í leiklutunum síggja vit m.a. Anneke von der Lippe, i› vit kenna sum "Barbu" í filminum hjá Nils Malmros. Ole Michelsen, sum um dagarnar fekk vir›isløn frá starvsfeløgum í danska útvarpinum fyri gott fakligt og málsligt avrik í sendingini "Bogart", gav norska filminum 4 av tiltiknu Bogart-hattunum í fjør. Stikkor› at hava vi› til filmin "Stjørnurnar" í Nor›urlandahúsinum mánakvøldi›: vinalag, lívsgle›i, tey nærmastu, dey›i, sjúka og sorg.

Tøl, i› tala

Íslandskir menn hava væl betri útbúgving enn norrønu brø›ur teirra. 40% av teimum hava í minsta lagi 13 ára útbúgving. Í Danmark eru ta› bara 23 % sum kunnu breggja sær av so mongum árum á skúlabeinki, me›an tølini fyri Noreg, Svøríki og Finnland eru ávikavíst 28%, 31% og 33%. Í sí›stu viku var› norrøna hagtalsbókin "Nordisk Statistisk Årbok" løgd fram á tí›indafundi í Keypmannahavn. Bókin, sum fevnir um 300 bla›sí›ur vi› turrum hagtølum, fæst eisini vi› tedlufløgu, har hópurin av frágrei›ingum kunnu finnast. Ritstjórin Klaus Munch Haagensen, sum starvast hjá donsku Hagstovuni sigur, at ymsu norrønu tølini nú kunnu setast saman og geva áhugaverd úrslit fyri hin forvitna. Hædd er altso tikin fyri frávikum í ymsu londunum, tá umræ›ur savnan og uppger› av hagtølum. Ein uppl‡singur í bókini er, at í øllum Nor›anlondum eru kvinnur oftari frá arbei›i vegna sjúku, samanbori› vi› menn. Men hví hava nærum 4 % av øllum norskum arbei›andi kvinnum veri› sjúkar í minst eina viku, me›an hetta bara er galdandi fyri 1,5% av donsku arbei›andi kvinnunum? Ritstjórin veit einki svar, men sta›festir at tølini eru røtt. Kann hugsast, at donsku kvinnurnar er bangnari fyri at missa arbei›i, um tær eru sjúkar? Norrøna hagtalsbókin fevnir eisini um tøl fyri trivna›ar- og útbúgvingarøki›, eins og mentan og kunningartøkni. H. N. Jacobsens bókahandil selur hesa, eins og a›rar líknandi bøkur frá Nordisk Ministerråd.

Tróndur til Flensborg

Hósdagin letur Tróndur Patursson upp eina frams‡ning vi› málningalist og list úr glasi í Flensborg. Ta› er danska bókasavni› í b‡num, sum saman vi› Listafelagnum í Su›urslesvík og Norrønu kunningarstovuni á sta›num skipa fyri frams‡ningini. Í skránni siga tey, at Tróndur arbei›ir í "klarest mulige farvekontaster som sort og blå". Norrøna kunningarstovan hevur virka› í dansk-t‡ska markna›arøkinum í tr‡ ár. Í hesum sambandi ver›ur veitslumóttøka, har evni› er Útnor›ur. Gestarø›ari er íslendski rithøvundurin Einar Már Gu›mundsson, i› skriva›i søguna "Alheimsins einglar", sum fekk bókmentavir›isløn Nor›urlandará›sins 1995. Filmurin hjá Fri›rik Thór Fri›rikson, i› byggir á somu søgu, ver›ur s‡ndur á norrønu filmstevnuni í grannab‡num Lübeck um vikuskifti. Eftir rø›u Einar Már's, ver›ur høvi at síggja frams‡ningina hjá Tróndi. Tiltaki› endar vi› sangi og tónleiki, sum grønlendski Rasmus Lyberth og danski Christian Alvad standa fyri.

Út at rógva

Í sambandi vi› alnótina ver›a oftani brúkt hugtøk sum at kasta, seta ella rógva. Ikki so løgi, tá ein hugsar um høvu›svinnu okkara og hvussu vanlig henda kunningartøknin er vor›in. Tveir 25 ára gamlir fransmenn, sum dáma væl at fer›ast, Moez Attia og Christophe Baillon, bjó›a nú umbor› á eina rætta sjófer› í telduni. Treytin er, at tú dugir franskt og ert íbundin alnótina. Undir heitinum "Fimm meginlond, fimm høpi" grei›a teir bá›ir frá um stø›, teir hava vitja›. "Verkætlanin skal læra børn í øllum heiminum at n‡ta nútímans samskiftismøguleikar, serliga alnótina", siga teir bá›ir Moez og Christophe, sum fyrst av øllum dáma væl at fer›ast. Bá›ir fóru úr París fyri ólavsøku og hava vitja› Argentina, Kili, Kuba, Meksiko, Avstralia og Tailand. Franska heimasí›a teirra fevnir um 300 myndir og brot úr videofilmum og hálvthundra› greinar. Fer›andi fransmenninir eru nú farnir eystureftir til India, Pakistan, Nepal og Bangladesh. Eftir jól ætla teir til Afrika og í summar til Eysturevropa. Anna›hvønn mána›a ver›ur heimasí›an www.5c5c.net dagførd. Ungu fer›ahuga›u fransmenninir eru lærdir teldutøkningar og vilja n‡ta n‡ggju tøknina at kn‡ta sambond vi› 10-14 ára gomul børn. "Alnótin letur upp ein heilt n‡ggjan heim fyri teimum" siga teir bá›ir fer›andi teldumenninir, sum fyribils bert skriva á fronskum.



Selja jólakalendara kring landi›

Í fara missiónsfólk og onnur at selja jólakalendaran, i› sæst omanfyri, um alt landi›.
Endamáli› vi› søluni er at hjálpa støkum forsyrgjarum vi› jólapakkum.

TELDUPOSTURIN

From: árni gregersen
Reply to: árni gregersen
To: <post@sosialurin.fo>
Subject: Teldubrævið 28. oktober

Heysti› myrkur - veturin

Fyrsti veruligi heystdagurin var hesa vikuna.

Løgi›, men líka til nú hevur ein havt varhugan av, at heysti› ongantí› fór at koma í ár.

Sjálvt um summari› onki hevur veri› at reypa av, so hevur ve›ri› veri› stak gott, og bæ›i september og oktober hava roynst væl. Sólin hevur skini›, og her í oktober hevur náttúran bert skift lit, og dagarnir eru vor›nir styttri. Ve›ri› hevur veri› ta› sama gott, stilt og l‡tt.

Men so kom broytingin: mánadagin fínasta ve›ur, men t‡sdagin var regn og vindur. Dagurin var knappliga nógv styttri. Myrkri› kom fyrr, og vit kyndu fyrr. Eitt sindur deprimerandi, men hinvegin eisini hugnaligt.

At ganga sær ein túr um kvøldi› og kenna roykin úr skorsteninum. Gott brenni úr skóginum angar væl. Tá i› ein gongur gjøgnum gøturnar í Nexø vi› mongu lágu húsunum, slepst ikki undan, at ein sær inn í smáu hugnaligu stovurnar.

Og ta› slepst heldur ikki undan at fyristilla sær allar lagnurnar handan gluggarnar. Hvat hugsa tey um? Lívi› dey›an, børn, ommu- og abbabørn? Framtí›ina?

Í gerandismeldrinum er sjálvdan tí› til slíkar tankar, men tá i› myrkri› kemur fyrr og kvøldini ver›a longri, fara tankarnir á flog. Summi kenna ta› tyngjandi vi› stuttu døgunum onnur kenna meira fri› á sær.

Hetta heysti› bleiv eitt sindur serligt. Avgerandi samrá›ingar millum Danmark og Føroyar uttan at føroyingar á nakran hátt standa saman.

Heysti› vekir minnir um søguna. Um tær samrá›ingar, sum fóru fram eftir fólkaatkvø›una í 1946, og um enn fornari tí›ir, tá i› føroyingar hava skula sta›i› saman.

Ta› sær út til ikki at bera til.

Sum eyglei›ari eitt sindur fjarstaddur, fær tú ta fatan, at ta› als ikki ber til hjá føroyingum at standa saman. Og hi›ani sæst t‡›uliga, at ta› hóvar forsætisrá›harranum stak væl.

Føroyingar eru als ikki samdir. Ergo: Ta› ber ikki til at samrá›ast vi› teir.

Samrá›ingarumfari› hesa vikuna er onki undantak. Onki úrslit og hvør fór til sítt. Danska pressan válkar sær í, at føroyingar ikki eru samdir.

Serfrø›ingarnir eru ósamdir. Hvat fer felagskapur Sameindu Tjó›a at siga? og fer ta› at hava nakra ávirkan á danskar politiskar myndugleikar?

Landsst›ri› hevur bo›a› frá fólkaatkvø›u næsta ár, me›an andstø›uflokkarnir krevja n‡val nú. At síggja hi›ani liggur alt í skeljasori. Nyrup hevur vunni› – føroyingar standa spjaddir og eru ikki komnir av fli›uni.

Sæ› hi›ani úr Eystrasalti sær myrkt út. Veturin er fyri framman, og ta› hómast bert einstakir glottar í havsbrúnni. Fara føroyingar at semjast um, at vit eru serstøk tjó›? Fer eitt n‡val at broyta stø›una ? Fer eitt møguligt n‡tt landsst‡ri at megna at savna føroyingar? Ella ver›ur ta› bert ósemja vi› mótsettum fortekni?

Nógvir spurningar skulu svarast ígjøgnum henda myrka vetur, sum stendur fyri framman. Kanska ver›ur hesin meira deprimerandi enn hugnaligur. Kanska er einasti glottin grækarismessan, tá i› tjaldir› kemur aftur og bo›ar frá ljósari tí›um.

Árni Gregersen
Bornholm

Goymslu-/ avgrei›slufólk søkist

Til goymslu-/avgrei›slu okkara á mjólkarvirkinum søkja vit eftir fólki.

Arbei›i› umfatar alt vanligt arbei›i í goymslu og handli okkara, umframt anna› fyrifallandi arbei›i.

Umsøkjarin skal kunna arbei›a sjálvstø›ugt.

At vi›komandi dugir at arbei›a vi› teldu og hevur koyrikort er ein treyt.

Løn og arbei›stí› ver›ur avtala› vi› lei›sluna hjá MBM.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í **seinasta lagi 13.11.2000.**

L/F Meginfelag Búna›armanna
Búna›ardepilin
FO-410 Kollafjør›ur

Hvalbiar Skúli

Søkt ver›ur eftir vikari fyri lærara í barnsbur›arfarloyvi frá uml. 1. desember og 24 vikur fram. Tímatali› er 27 tímar um vikuna.

Lærugreinir: Tekstvi›ger› 8.-9. fl., landalæra 6.-7.-8.-9. fl., føroyskt 1.-3. fl., serundirvísing, bókasavn og flokslærari hjá 1. fl.

Starvi› er tí›aravmarka› og ver›ur lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálast‡ri›.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 6. november 2000.

Hvalbiar Skúlanevnd
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

KUNNGERÐ

Sagt verður frá, at valkort til býráðsvalið tann 21. november 2000 eru send teimum, ið standa á vallistanum.

Um veljari hevur ikki fingið valkort í seinasta lagi 13. november 2000, verður hann biðin um at gera vart við hetta í snarkivuni, tlf. 31 51 60, lokal 135.

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ

S N A R S K I V A N



Íbú› søkist

Fyri eitt av starvsfólkum okkara ver›ur hervi› søkt eftir íbú› beinanvegin.

Vinaliga seti› tykkum í samband vi› okkum skjótast gjørligt.

demich
Sti›jagøta 2 - Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

Starv
á Statoil stø›ini í Sørvági

Søkt ver›ur eftir fólki til Statoil stø›ina at byrja skjótast.

Arbeitt ver›ur í vaktum.

Sp/f Handilsvirki› Niclasen
380 Sørvágur · Tlf. 332001

Klaksvíkar Kommuna
Barnsbur›aravloysari til sosialrá›gevan hjá barnaverndarnevndini:

Eitt starv sum barnsbur›aravloysari fyri sosialrá›gevan hjá barnaverndarnevndini á sosialu deild hjá Klaksvíkar b‡rá› er leyst at søkja í tí›arskei›inum frá 1. desember 2000 til 14. juli 2001 er leyst at søkja.

Arbei›i› fevnir m.a. um:
- At rá›geva innan fyri barnaforsorgarlógina
- At rá›geva og lei›beina foreldrum og børnum/ungum
- At rá›geva, lei›beina og at gera tilmælir til barnaverndarnevndina
- At vera skrivari hjá barnaverndarnevndini
- At samstarva tvørfakliga

Umsøkjarar skulu hava sosialrá›gevaraútbúgving.

Lønar- og setanartreytir:
Starvi› ver›ur sett sambært sáttmála millum Klaksvíkar Kommunu og Starvsmannafelagi› og lønt í lønarflokki 18/22.

Nærri fæst at vita um starvi› vi› at venda sær til Tonju Ziskason, sosialrá›geva hjá barnaverndarnevndini, ella Jancy Biskopstø Klein, lei›ara av sosialu deild á tlf. 456388.

Umsókn:
Umsókn vi› avriti av prógvi og møguligum vi›mælum skal sendast til:

Klaksvíkar Kommunu
Postboks 2 · 700 Klaksvík
stíla› til Barnaverndina/sosialu deild

Umsóknarfreist er 15.11.00.

Hølir í mi›b‡num til leigu

Hølini á a›ru hædd í bygninginum hjá Havnar Sjúkrakassa eru til leigu.

Hølini eru umlei› 128 fermetrar tilsamans.

Møguleiki ver›ur fyri at leiga eina hædd afturat næsta ár.

Havnar Sjúkrakassi

Rá›gevingarmi›stø›in

Avgrei›slan hevur fingi› n‡tt telefonnummar. Nummari› er **441060** ella **222280**.

Vinarliga
Diana Borgn‡ardóttir

Cafeteria-medhjælper
til Flyvestation Tórshavn

En stilling som overenskomstansat CAFETERIA-MEDHJÆLPER med 30 timer pr. uge er ledig ved Flyvestation Tórshavn og ønskes besat pr. 1. januar 2001.

Arbejdsområde:
Planlægning, tilrettelæggelse, fremstilling, kontrol og salg af produktionen og øvrigt varesortiment.
Salg, service og kassebetjening.
Planlægning, tilrettelæggelse, gennemførelse og kontrol af indkøb ved lokale firmaer.
Lagerstyring.
Daglig rengøring af køkkenet.

Kvalifikationer:
Erfaring fra lignende stilling ønskeligt.
Evne til at arbejde selvstændigt.
Gode samarbejdsevner samt ordenssans.

Aflønning:
I henhold til organisationsaftale for hushjælpere i statens tjeneste af 10. maj 1996 mellem Finansministeriet og Forbundet for Offentlige Ansatte. Der er endvidere til stillingen knyttet et særligt Færø-tillæg på kr. 600,00 pr. måned.

Ansøgning:
Skriftlig ansøgning bilagt dokumentation for uddannelse samt oplysning om tidligere og nuværende beskæftigelse indsendes til:

Flyvestation Tórshavn
Postboks 3217
FO-110 Tórshavn

mærket »CAFETERIAMEDHJÆLPER« inden den 24. november 2000.

Nærmere oplysing om stillingen kan indhentes ved Flyvestation Tórshavn, tlf.: 311480, Andrass Thomsen lokal 2130.